UTTAN ÚR HEIMI

### Hugsaði um egnan vinning

Tað var ikki bara fyri at mótmæla afturtøkuni úr Gazageiranum, at Benjamin Netanyahu valdi at fara úr ísraelsku stjórnini seinasta sunnudag. Í Ísrael eru tey flestu á einum máli um, at hann gjørdi tað fyri egnan vinning.

Netanyahu er kendur sum ein av heykunum í ísraelskum politikki. Hann var forsætisráðharri til 1999, og nú hevur hann sett sær fyri at noyða Ariel Sharon at skriva út nýval. Meiningakanningar hava víst, at millum veljararnar hjá høgravonginum er Netanyahu betur umtóktur enn forsætisráðharrin.

Eygleiðarar í Ísrael siga, at Netanyahu hevur longu lagt eina ætlan um, hvussu hann skal noyða Sharon at skriva út nýval í úrtíð. Tjóðartingið hevur ikki samtykt fíggjarlógina fyri 2006 enn, og verður hon ikki góðkend innan mars næsta ár, skal forsætisráðharrin skriva út nýval, tí tað sigur stýrisskipanin. Netanyahu og hansara viðhaldsmenn í tinginum kunnu forða fyri, at fíggjarlógin verður samtykt, og tí vænta eygleiðararnir, at ísraelsmenn skulu í valhølini næsta ár.

### Rasuskilnaður í Suðurafrika

Suðurafrikanar bíða í hesum døgum við spenningi eftir dóminum ímóti tveimum monnum, sum eru ákærdir fyri at hava myrt ein húskall á sera óhugnaligan hátt.

Annar av teimum ákærdu er tann hvíti bóndin Mark Scott-Crossley, og hin er ein av húskallum hansara. Teir eru ákærdir fyri at hava myrt tann svarta húskallin Nelson Chisale. Sambært ákæruvaldinum bleiv hann bundin og illa viðfarin, og tá hann hevði mist virði, bleiv hann tveittur inn í ein leyvugarð. Tá løgreglan fór inn í leyvugarðin at leita, var at kalla einki eftir av manninum.

Í apríl dømdi ein dómstólur Mark Scott-Crossley og ein húskall hansara sekar í morði, og nú skal dómstólurin taka støðu til, hvørja revsing teir skulu fáa. Rættarmálið hevur vakt sera stóran ans í Suðurafrika, tí mong uppfata tað sum eitt tekin um, at tann gamli rasuskilnaðurin frá apartheid-tíðini livir enn, hóast ellivu ár eru liðin, síðani tann svarti meirilutin fekk valdið í landinum.

### Grør kring Tjernobyl

Ukrainskir granskarar siga, at plantu- og djóralívið kring gamla kjarnorkuverkið Tjernobyl er meiri fjølbroytt nú, enn tað var undan vanlukkuni á verkinum fyri 19 árum síðani.

Umleið hundrað djórasløg, sum vórðu mett at vera í vanda fyri at doyggja út, vísa seg at trívast væl, og fleiri djórasløg so sum úlvar og bjarnir búleikast nú í økinum. Tey vóru ikki har frammanundan. Ukrainsku granskararnir siga eisini, at plantulívið trívist væl. Teir halda hetta vera tekin um, at geislavirknið frá vanlukkuni ávirkar ikki planturnar longur, og tí er grøðin har helst ikki so vandamikil fyri fólk at eta sum fyrr hildið, siga granskararnir.

Tær broyttu umstøðurnar hava fingið ukrainsku myndugleikarnar at umhugsa at lata ferðafólk sleppa at vitja økið kring Tjernobyl, tí áhugin hevur víst seg at vera stórur. ST mælti longu í 2002 myndugleikunum til at lata ferðafólk sleppa hagar.

### Á ferð um mánan

Amerikanska fyritøkan Space Adventures hevur ætlanir um at bjóða fólki at sleppa á ferð kring mánan, og gongst eftir ætlan, kunnu tey fyrstu ferðafólkini sleppa á mánaferð um tvey ár.

Tað eru bara tey fægstu, sum kunnu droyma um at sleppa eina flogferð kring mánan, tí sambært Space Adventure fer ferðaseðilin at kosta umleið 600 milliónir krónur. Fyritøkan væntar heldur ikki tann stóra eftirspurningin, tí hildið verður, at tað eru bara millum 500 og 1.000 fólk í heiminum, sum hava ráð til eina slíka ferð.

Space Adventures hevur fyrr sent tvey ferðafólk út á altjóða rúmdar-støðina ISS. Tann fyrri ferðamaðurin, Dennis Tito, sigur við AP, at hevði hann verið yngri, hevði hann kanska farið kring mánan eisini. Men í dag er hann ov gamal, sigur hann.

# Hon vil sleppa at tosa við Bush

**Cindy Sheehan misti sín 24 ára gamla son í Irak. Nú vil hon sleppa at tosa við George W. Bush, forseta, tí tað var hann, sum sendi son hennara í kríggj**

USA
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*



*Cindy Sheehan vil sleppa at tosa við George W. Bush, forseta, tí hann sendi son hennara, Casey, til Irak. Fimm dagar seinni doyði hann í skotbardaga í Bagdad*
*Mynd: Reuters*

Casey Sheehan fór upp í amerikanska herin fyri fimm árum síðani. Hann roknaði ikki við at blíva sendur í kríggj, men tað bleiv hann. Hann fekk boð um at fara til Irak, men fimm dagar eftir, at hann var komin hagar, doyði hann í einum skotbardaga í Bagdad.

Nú vil 48 ára gamla mamma hansara sleppa at tosa við George W. Bush, forseta, tí tað var hann, sum sendi sonin til Irak. Seinastu vikuna hevur hon gingið uttan fyri bústað forsetans í Crawford í Texas, har Bush heldur summarfrí hendan mánaðin.

Men Bush vil ikki tosa við hana. Hann sendi boð eftir trimum embætismonnum í Hvítu Húsunum og bað teir tosa við hana. Men Cindy Sheehan sigur, at fundurin teirra millum var nyttuleysur, og at hon framvegis vil hava orð á forsetan sjálvan. Men Bush hevur ongan hug at tosa við hana. Fyrradagin segði hann við tíðindafólk, at hann skilir støðu hennara.

Kravið hjá mammuni hevur vakt ans í USA, og seinastu dagarnar eru fleiri fólk komin til Crawford at stuðla henni. Eisini fleiri politikarar taka undir við hanni, og nú hava 40 demokratiskir kongresslimir mælt forsetanum til at ganga kravi hennara á møti.

Higartil hava næstan 1.900 amerikanskir hermenn latið lív í krígnum í Irak. Cindy Sheehan vil hava Bush at taka hermenninar heimaftur, áðrenn fleiri lat lív.

# Bjóðar Hillary Clinton av

**Tað kann væl hugsast, at tvær kvinnur fara at stríðast um at umboða New York í Senatinum.**

POLITIKKUR
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Enn eru 15 mánaðir til næsta senatsvalið í USA, men í New York byrjaði valstríðið longu í hesari vikuni, tá tann 53 ára gamla Jeanine Pirro kunngjørdi, at hon ætlar sær at royna at gerast valevni hjá republikanarunum. Mál hennara er at taka senatssessin frá einari aðrari kvinnu, Hillary Clinton.

Eygleiðarar í New York siga, at tær eru rættiliga líkar. Báðar eru í fimmtiárunum, báðar eru løgfrøðingar, báðar duga at gera vart við seg, og báðar eru líka reystmæltar. Harafturat kemur, at báðar hava havt trupulleikar av, at menninir hava fjeppast uppi í øðrum kvinnum. Ein eyka vansi hjá Jeanine Pirro er, at maður hennara, Albert, hevur sitið ellivu mánaðir í fongsli fyri skattasvik.

Jeanine Pirro hevur harafturat tann veikleika, at hon er ikki so væl kend sum Hillary Clinton. Allir amerikanarar kenna Hillary sum konu fyrrverandi forsetan Bill Clinton og sum senator í New York, og fleiri rokna eisini við, at hon fer at stilla upp til forsetavalið í 2008.

Júst hetta seinasta er ein partur av valstríðnum hjá Jeanine Pirro. Hon vil vera við, at Hillary Clinton brúkar senatssessin sum eitt slag av einari lopfjøl til forsetaembætið.

– New York hevur brúk fyri einum senatori, sum raðfestir New York fremst, og ikki einum, sum roynir at tekkjast fólki í Florida, Iowa, New Hampshire og aðrastaðni, sigur Jeanine Pirro. Hillary Clinton hevur ikki svarað enn.

Jeanine Pirro sigur, at hon tekur undir við skattapolitikkinum hjá Bush, forseta, og at hon styðjar eisini forsetan í bardaganum ímóti yvirgangi. Men tey eru ikki samd um alt, tí Jeanine Pirro er fyri fosturtøku og ímóti deyðarevsing.